KRINGVARP FØROYA

# Leiðari til Aktuelt deildina í Kringvarpi Føroya

*Kringvarp Føroya søkir eftir leiðara til deildina Aktuelt, sum er tíðindadeildin í Kringvarpinum. Starvið hevur verið tíðaravmarkað, men nú er talan um varandi starv.*

Sum leiðari á deildini Aktuelt skalt tú leiða størstu redaksjónina í landinum við tíðindum frá morgni til á kvøldi. Deildin Aktuelt fevnir um tríggjar tíðindapallar – sjónvarp, útvarp og netmiðilin. Harafturat hoyrir morgunsendingin til deildina.

Tú fært sostatt møguleikan at seta dagsskránna í føroyska samfelagnum í einum spennandi og fjølbroyttum starvi við nógvum avbjóðingum.

Sum leiðari skalt tú tryggja, at Aktuelt varpar ljós á samfelagið, og at áleikandi evni verða greinað og perspektiverað á ein dygdargóðan hátt. Tú skalt tryggja, at tíðindaflutningurin á deildini er viðkomandi, álítandi, óheftur, kritiskur og skjótur.

Aktuelt hevur egna rakstraræltan, og sum deildarleiðari hevur tú fíggjarliga ábyrgd og skalt tryggja, at fíggjarætlanin heldur.

Sum leiðari skalt tú støðugt menna tíðindatænastu stovnsins, og tær sendingar, sum hoyra til deildina. Tí er tað er umráðandi, at tú sum leiðari á Aktuelt hevur eina greiða ætlan, hvussu journalistikkurin kann mennast á okkara miðlapallum.

Kringvarp Føroya hevur verið fyri stórum broytingum seinasta árið, og í summar eru øll starvsfólkini í stovninum flutt í kringvarpshúsini í Sortudíki. Vit eru í holt við at gera nýtt studio, og í næstum skal byggjast afturat kringvarpshúsinum. Sum leiðari fært tú harvið møguleika at ávirka gongdina fram móti betri hølisviðurskiftum við fleiri møguleikum at fremja journalistiska starvið hjá stovninum.

Leiðarin á deildini Aktuelt er partur av leiðsluni og vísir beinleiðis til stjóran.

## Ábyrgdarkrøv

- ✓ Leiða og menna tíðindatænastu stovnsins
- ✓ Tryggja at tíðindini eru viðkomandi, álítandi, óheft, kritisk og skjót
- ✓ Tryggja at journalistikkurin á okkara miðlapallum er í støðugari menning

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 www.kringvarp.fo

**Førleikar**

- ✓ Viðkomandi útbúgving, t.d. innan miðlaøkið
- ✓ Royndir við tíðindum á ymiskum miðlum
- ✓ Leiðsluroyndir
- ✓ KT kunnleika, málsligan førleika og breiða vitan um samfelagsviðurskifti

Vit vænta, at tú dugir væl at samskifta, ert forvitin og hevur áhuga í eitt nú nýggjum miðlum. Tú vísir ábyrgd og kveikir starvsfólk. Tú dugir at raðfesta, heldur tíðarfreistir og hevur dirvi at taka neyðugar avgerðir. Tú hevur ein jaligan hugburð, ert ein liðspælari og arbeiðir miðvíst við ætlanum at menna deildina og arbeiðsplássið sum heild.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sum skjótast. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tann, sum sett/-ur verður, má tola broytingar í starvsinnihaldinum. Starvið hevur eina royndartíð á 5 mánaðir.

**Umsóknir**

Send tína umsókn við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum við teldubrævi til: dm@kvf.fo

**Freist**

Umsóknarfreistin er á middegi, mikudagin 20. november 2013.

**Upplýsingar**

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Dia Midjord, kringvarpsstjóra, tlf 347500

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýrið við 7 limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá spølum og lýsingum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir; Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Fíggjarætlanin er 57 mió kr. Í Kringvarpi Føroya eru 73 ársverk.*